# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Gigga Mouritsen 90 ár

Fríggjadagin 28. oktober fylti Signhild Margretha Mouritsen í Havn, vanliga nevnd Gigga, 90 ár.

Gigga er serliga kend frá Kaffivogninum, sum hon saman við manninum Carl Mouritsen rak í 40 ár Eystaru bryggju í Havn. Gigga og Carl skaptu eitt sera hugnaligt umhvørvi í Kaffivogninum, har nógv arbeiðsfólk í Havn høvdu sína føstu gongd.

Gigga er ættað úr Sørvági, er næstelst av einum systkinaflokki upp á 7, har 6 teirra eru á lívi í dag. Foreldrini vóru Kristina og Johannes Joensen, úti á Lið í Sørvági.



Hini systkini eru: Louis Joensen í Sørvági, sum doyði í 1975, 61 ára gamal, Luffa Mouritsen og Poul Arni Joensen, sum búgva í Havn, Kristoffur Joensen, sum býr á Argjum, Karla Hansen, sum býr í Runavík, og Lea Hansen, sum býr í Sørvági.

Gigga giftist við Carl Karbech Mouritsen, prentara, í Havn í 1935. Tey hittust sum ung í Sørvági, tá Carl vitjaði systrina Margrethu (Giggu), sum var gift Jákupi av Skarði, sum var lærari í Sørvági um tað mundið.

Gigga og Carl fingu tilsamans 12 børn, harav 9 eru á lívi. Tey eru: Gunnleivur og Eydna (Viderø), sum búgva í Havn, Poula Margretha (Keldorff) og Arndis (Davidsen), sum búgva í Danmark, Jákup (Aggo), sum býr i Havn, Kris og Johannes, tvíburar sum doyðu í 1941, hálvt ára gamlir av lungnabruna, Karin, Kári, Rógvi og Elin, sum øll búgva í Havn. Yngstur var Bogi, sum brádliga doyði av sjúka í 1960, 11 ára gamal.

Gigga hevur verið einkja síðan Carl doyði í 1989, 78 ára gamal.

Gigga hevur eitt sjaldsama positivt og ljóst lyndi, og skapir gleði har hon kemur. Líkamikið hvat ið hendir, sær hon fram um alt, og sigur at tað nokk fera at blíva betri. Hóast høga aldurin klárar hon alt tað vanliga arbeiði í heiminum uttan nakra hjálp.

Gigga eigur 18 ommubørn og 30 langommubørn.

Føðingardagurin varð hildin saman við familjuni.

## Andlát og jarðarferðir

**Marianna Mortensen** ættað av Tvøroyri, búsitandi í Vanløse, andaðist á Bisbebjerg Hospital mikudagin 26. Oktober, 85 ára gomul.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellin um fríggjakvøldið kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin klokkan 14.00.

**Anna Nora Winther**, fødd Gray, búsitandi í Helsingør, andaðist týskvøldið 25. oktober, 61 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Stenhs kirke Vapnagaard, Helsingør, mánadagin 31. oktober kl. 13.

**Peter Christian Johannesen**, vanliga nevndur Petir hjá Fritleif, úr Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 26. oktober, 79 ára gamal.

**(Jonn)John Johansen**, Tórshavn, ættaður úr Miðvági, andaðist týskvøldið, 76 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Magni Nolsøe**, Vágur, andaðist 27. oktober, 17 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

## Magnus S. Olsen 85 ár

Sunnudagin 30. november verður Magnus S. Olsen í Runavík 85 ár.

Magnus er ættaður úr Rituvík, elstur av teimum 12 børnunum hjá Elspu og Magnusi Olsen, á Líðini. Øll systkini eru á lívi, og eru 5 av teimum yvir 80 ár. Í fjør var øll familjan savnað til hátíðarhald, tá ið systkini kundu halda at tey vóru 900 ár tilsamans.

Magnus fór, sum flestu dreingir tá í tíðini, ungur til skips. Í 1936 fór hann við "Yvonnu", sum pápi hansara førdi. Var síðani við "Silverbelle" og "Phebee". Hana førdi pápi hansara, til hann doyði av sjúku í desember 1940. Tá var Magnus 20 ára gamal, og yngsti bróðurin bara 2 ára gamal, og soleiðis sum sosiala skipanin var tá, so lá ein stór ábyrgd á honum, og hinum eldru systkjunum, øll hansara ungdómsár. Tó sá hann ongantíð hetta sum nakra byrðu.

Magnus sigldi øll krígsárini. Í 1944 tók hann setuskiparaprógv. Eftir kríggið sigldi hann mest við trolarum, og var við "Hjørdis", eini skonnart sum var umbygd til trolara, tá eldur kom í hana, og hon sakk í Godthåbsfjørðinum í Grønlandi í 1954. Manningin var øll bjargað.

Seinnu helvt av 50'unum var Magnus við íslendsku trolarunum "Goðanes" og "Gerpi". Var síðani við "Fiskanes" í 60-61, við "Morning Star" og "Oknini", til hann mitt í 60-unum legðist upp á land.

Magnus giftist við Birthu Justinussen úr Leirvík, dóttir Elspu og Tummas á Garði. Tey giftust inn á



Líðini í Rituvík, og búðu har í 10 ár. Tá fluttu tey til Runavíkar har tey høvdu bygt sær hús.

Magnus og Birtha fingu 4 børn, Regin, Marjun, Tórhild og Eilen, og barnabørnini eru 11 í tali. Birtha doyði í 2002.

Magnus er náttúrumenniskja burturav. Tá ið hann legðist upp á land, fór hann at arbeiða á flakavirkinum Lynfrost í Runavík. Men ikki treivst hann innanfyri 4 veggir soleiðis dag um dag, so hann søkti sær annað arbeiði. Hann kom so í arbeiði hjá Landsbyggifelagnum og síðani E.Pihl & Søn, og arbeiddi hann har, til hann var um 70 ára aldur, burtursæð frá 3 árum umborð á "Magnusi í Rituvík". Umleið 1990 vóru niðurgangstíðir í landinum, og tá helt hann at onkur yngri maður hevði meira brúk fyri arbeiðinum enn hann, og gavst.

Magnus er at síggja til gongu dagliga, og er hann sera áhugaður í øllum sum gongur fyri seg á staðnum, og í samfelagnum yvirhøvur.

Føðingardagurin verður hildin saman við børnunum.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**John S. Johansen**
**ættaður úr Miðvági**

búsitandi í Tórshavn, andaðist týsdagin 25. oktober, 76 ára gamal
Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni sunnudagin 30. oktober, kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*

**Eileen, Jógvan, Katrin, Inga og Thyra**

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**